Løgmálaráðið

Dagfesting: 24. oktobur 2023
Mál nr.: 23/15652
Málsviðgjørt: GMN

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 94... *Stk. 4*. Fyri brot á §§ 210 og 216-224, § 225 sambært §§ 216-224, § 226, § 227, stk. 1,§ 245 a, § 246, samanber við§ 245 a, § 260, stk. 2, og § 262 a, stk. 2, móti einum persóni undir 18 ár, ella á § 232 móti einum barni undir 15 ár, verður fyrningarfreistin tó í fyrsta lagi roknað frátí degi, at tann órættaði fyllir 21 ár.	**1.** Í § 94, stk. 4 verður "ella á § 232" broytt til: "ella á §§ 229 og 232"
§ 225. Ásetingarnar í §§ 216-224 galda eisini fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.	**2.** § 225 verður orðað soleiðis: "**§ 225**. Ásetingarnar í §§ 216-224 eru eisini galdandi fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu. Ásetingarnar eru somuleiðis galdandi, tá ið gerningsmaðurin fær órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan."
§ 228. Brot á §§ 218 ella 222-224, § 225 sambært §§ 218 ella 222-224, § 226 ella § 227, stk. 1, verða lutvíst linari revsað, um gerningsmaðurin av ókunnleika um tilstandin ella aldurin hjá tí órættaða ikki	**3.** Í § 228 verður "ella § 227, stk. 1" broytt til: ", § 227, stk. 1 ella § 229".

kann sigast at hava handlað tilætlað, men tó í ósketni.	
	4. Aftaná § 228 verður sett: “**§ 229**. Fyri lokking verður tann revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár, sum miðvíst ella við snildir og við at misnýta sína yvirvág í aldri og royndum byggir upp eitt samband til ein persón undir 18 ár við ætlan um at fremja kynsligt brotsverk móti viðkomandi.”